**Røða í sambandi við, at farið verður undir økispsykiatri í Sandoy og Skúvoy**

Góðu tit

Í dag er ein stórur dagur. Nú vit hátíðarhalda, at eisini Sandoyggin og Skúvoyggin verða fevnd av økispsykiatriini, markera vit samstundis, at økispsykiatriin er vorðin landsfevnandi og ein tænasta, sum nú stendur øllum okkara borgarum í boði kring alt landið.

Tað eri eg ómetaliga fegin um. At útbyggja økispsykiatriina, so eisini fólk við sálarsjúku kunna fáa tænastu úti í økjunum og harvið kunna fáa betri lívsgóðsku og livikor, er eitt av mínum hjartamálum og í veruleikanum ein av orsøkunum, sum fekk meg til at fara upp í politikk.

Tí er tað ein serliga góð kensla at standa her í dag, og eg eri sera takksom fyri heiðurin at siga nøkur orð til hesa hátíðarløtu.

Í dag byrjar nýtt tíðarskeið í psykiatrisku søgu okkara við tað, at økispsykiatriin verður sett á stovn á Sandoynni og í Skúvoynni. Hetta er triðja hátíðarløta av hesum slag, sum eg eri sloppin at vera partur av. Í fjørð var eg fyrst í Suðuroynni og eisini í Vágum, tá hesi økir komu undir skipanina. Onkursvegna kennist tað sum júst hesin ringur nú verður sluttaður, og eg føli veruliga, at tað gevur meining at vera í politikki.

Tað er staðfest, at ójavni í heilsu er orsøk til, at ymiskir bólkar av fólki hava lægri livitíð enn onnur. Eisini vita vit, at ójavni í heilsu hongur saman við sosialum korum; tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og vælveru generelt. Tí snýr dagurin í dag, har vit byrja økispsykiatriina her hjá tykkum, um at fáa javnbjóðis rættindi til allar sjúklingar. Hetta er eitt aðalmál í sjálvum sær, bæði hjá mær sjálvari eins og heimsheilsustovnurin WHO leggur stóran dent á hetta.

Hetta kann kanska lýsast við orðunum hjá Hans Andrias Djurhuus í yrkingini “Tey standa og vagga og tráa”, har øksini á akrinum ilskast á eitt teirra, ið er øðrvísi.

“Men dáin stendur í iva

Og hann hevur ymsan lit;

“Eg havi væl loyvi at liva

her líka so væl sum tit”

Søguliga hava vit ikki verið dugnalig at tikið okkum av sálarsjúkum. Í stóran mun hava hesi fólk livað undir vána korum, annaðhvørt í útlegd ella meira ella minni goymd burtur her hjá okkum. Og ofta bæði goymd og gloymd. Tíbetur er siðaskifti í gongd og psykiatriin er í stórari menning.

Fokus er nú á, at sálarsjúka ikki nýtist at vera kronisk, og at góðir møguleikar eru bæði at koma seg aftur, og at fáa tað betri. Hetta er vitan, sum gevur vón. Og hetta er nýggj vitan.

Fólk við sálarsjúku hava upplivað, og upplivað helst enn, at vera stigmatiseraði og kanska eisini útihýst. Hetta kemur týðiliga til sjóndar, tá ið sálarsjúk siga sína søgu. Og tíbetur eru tað fleiri og fleiri fólk við sálarsjúku, sum siga sína søgu. Tað kunnu og skulu vit læra av.

Við opinleika og kunning kunnu vit øll blíva klókari og læra okkum at handfara støðuna soleiðis, at vit megna at rúma hesum søgum og hesum menniskjum. Harvið kunnu hesar søgur gerast søga. Tí hvat kann vera verri enn stigmatisering og isolatión oman á tað at hava sálarligar trupulleikar. Tað kann bara gera støðuna verri.

Undirvísing og almenn kunning eru lyklaorð, og her kann økispsykiartriin veruliga gera mun við at arbeiða í lokalsamfelagnum bæði við avvarðandi, sjúklingum, sjúklingafeløgum, tvørfakligt og alment.

Tíbetur er sjóneykan nú eisini sett á at fáa varpað ljós á tær góðu søgurnar í psykiatriini - og teimum hava vit tørv á. Tað eru mangir av okkara borgarum, sum liva eitt heilt vanligt lív, hvat tað so enn er, hóast teir eitt tíðarskeið í lívinum hava havt sálarsjúku. Tað eru eisini fólk sum livað eitt meiningsfult lív við sálarsjúku. Hetta er eisini neyðugt at fáa fram í almenna rúminum. Vit kunnu øll blíva rakt. Tað er onki at ivast í, at miðlingin higartil við nógvum neiligum søgum um psykiatriina og sálarsjúku eisini kann vera stigmatiserandi í sjálvum sær, so fólk fara at ræðast økið sum heild. So eg ynski heilsugóðu søgunum vælkomnum, samstundis sum eg eisini havi fulla virðing fyri, at vit sjálvsagt eisini skulu megna at rúma neiligu søgunum og hjálpa teimum menniskjunum, sum kenna seg slept uppá fjall.

Í søguligum høpi er psykiatriin nýggj í Føroyum. Men fólk við sálarsjúku hava verið allar dagar. Tey hava bara ikki fingið ta hjálp, tey hava havt fyri neyðini. Tað var ikki fyrr enn seinast í 60-árunum, at psykiatriin so smátt byrjaði. Árini frammanundan hevði man sent nógv fólk av landinum til viðgerð, og mong vóru tey og tær familjur, sum royndu sum frægast kring landi alt at hjálpa sínum sum best. Sorgarsøgurnar hava verið nógvar, og er hetta ein døkkur blettur í okkara søgu. Lat tað nú vera søgu, og lat okkum gleðast um, at nú er enn eitt fet tikið rætta vegin.

Tað skal ein áhaldandi menning og hugburðsbroyting til, at vit koma hartil, at sálarheilsan og likamliga heilsan verða javnsettar.

Sálarheilsan má fáa sama status, virðing og somu rúmd, sum likamliga heilsan. Skjót og góð hjálp má vera øllum í boði, og orð mugu setast á avbjóðingarnar, sum sálarsjúk hava, og sum samfelagið hevur.

Øll kenna vit dømi, at tá ið fólk eru likamliga sjúk, so vekir tað umsorgan í okkum, og vit brýggja okkum um, hvussu viðkomandi hevur tað. Vit ringja og spyrja, støkka inn á gólvið o.s.fr. og vilja

vita, hvussu viðkomandi hevur tað. Tíverri sæst hetta alt ov sjáldan, tá ið fólk eru sálarsjúk. Minnist, at Tórmóður Stórá orðaði tað soleiðis einaferð, at ”tað er langt millum bukettirnar á Psykiatriska deplinum”.

----

Tá ið vit nú fara undir útbyggingina á Landssjúkrahúsinum, verður psykiatriin partur av vanliga sjúkrahúsinum. Á jøvnum føti við hinar sergreinarnar. Ikki løgd til viks, sum søguliga hevur verið gjørt.

Fysisku karmarnar á psykiatriska deplinum hava verið alt  annað enn nøktandi. Tí hava vit valt at gera stórar dagføringar á deplinum, hóast vit byggja nýtt. Fyri meg kendist tað púra óetiskt at lata sjúklingarnar vera í so niðurslitnum umstøðum, sum eg upplivdi, tá ið vit tóku við. Tí er gleðiligt, at vit eisini har hava bøtt um karmarnar fyri psykiatriina í Føroyum. Tí sjúklingar hava tørv á at vera innlagdir av og á, og tá hava eisini fysksku karmarnir týdning.

Tá ið vit fyri stuttum valdu nýtt Fólkaheilsuráð, løgdu við áherðslu á, at hugtakið fólkaheilsa skuldi skiljast í breiðastu merking, og at sálarheilsan skuldi hava javnbjóðis part. Alt hetta skal hjálpa okkum á leiðini til størri opinleika og rúmd fyri, at menniskjaliga heilsan rúmar bæði eina likamliga og eina sálarliga dimensjón, umframt, at vit eru sosialar og andaligar verur.

Heimsheilsustovnurin WHO hevur víst á, at um vit ikki arbeiða við einum breiðum heilsuhugtaki og taka sálarheilsuna við, so røkka vit ikki málinum um javnvirði í heilsu, sum er eitt mál í sjálvum sær. So tað taka vit í álvara.

Ein spennandi verkætlan er við at síggja dagsins ljós, nú Fólkaheilsuráðið hevur sett fólk burturav at arbeiða við ABC fyri mentalari heilsu. Henda verkætlan skal virka breitt í samfelagnum og gera okkum varug við okkara sálarheilsu, og hvat vit kunnu gera fyri at fremja sálarheilsuna, trivnað og vælveru. Tað er eisini áhugavert at Fólkaheilsuráðstevnan, sum nú verður, so at siga einamest snýr seg um sálarheilsuna. So jú, sálarheilsan er  veruliga komin á breddan.

----

Tað er alneyðugt at hava góð heilsu og røktartilboð í umhvørvinum, har fólk búgva. Serliga sálarsjúka er soleiðis háttað, at hesi menniskju í ávísum førum als ikki megna at ferðast til Havnar at fáa sær hjálp. Hjálpin má tí út til hesi menniskju.

Tað eru heilt vist fólk í okkara landi, sum als ikki fáa rætta og nøktandi hjálp. Vit kenna tað frá øðrum økjum í Føroyum, sum hava fingið sett økispsykiatri í verk, at tann tørvurin, man metti var á tænastuni frammanundan, í veruleikanum var dupult so stórur, tá ið tænastan kom í økið.

Hetta er nokk ein samanrenning av, at tænastan knappliga verður tøk og kann skapa neyðugan tryggleika og umsorgan kring sjúklingarnar, umframt at starvsfólkið bæði kann gera uppsøkjandi

arbeiði og brýtur niður fordómar við at vera sjónlig í nærumhvørvinum. Frá øðrum fakbólkum og fólki á staðnum, fær sálarheilsuøkið somuleiðis størri ans. Tað skulu vit ikki undirmeta týdningin av.

----

Sálarsjúka rakar breitt og tykist vera vaksandi. Annarhvør er avvarðandi verður sagt. Sjálv eri eg av tí áskoðan, at vit øll eru avvarðandi, tí vit varða øll av hvør øðrum. Vit hava bæði eina samfelagsliga, menniskjaliga og etiska skyldu at taka hond um hvønn annan.

Í dag tekur føroyska samfelagið ein part av hesi skyldu á seg við at seta sjúkarrøktarfrøðingar í fast starv, til at røkja tænastu til heimabúgvandi borgarar í Sandoynni og Skúvoy. Sjúkrarøktarfrøðingarnir eru partur av Psykiatriska deplinum, og hava verið har norðuri og sett seg inn í fakøkið.

Tað er gott og neyðugt fyri starvsfólkini at vera partur av einum størri toymi, tí hetta er krevjandi arbeiði og eitt arbeiði, har starvsfólkini arbeiða nógv einsamøll. Stórur partur av arbeiðsamboðunum er eisini, umframt fakligir førleikar, tað menniskjaliga tilfeingið, hvørt einstakt starvsfólk hevur. Fyri at megna arbeiðið yvir áramál, er gott at vera partur av størri samanhangi.

Sum Birgit Andersen, sum er leiðari av økispsykiatriini, greiddi frá í miðlunum, so hevur tankin verið, at tað skal vera ein hurð at fara ígjøgnum, tá tú hevur tørv á viðgerð, hvørt talan er um sálarligan ella likamligan tørv. Men her á Sandi loyva hølisviðurskiftini hjá kommunulæknunum tó ikki, at økispsykiatriin eisini verður har, so fyribils er avtala gjørd við Almannaverkið, sum jú er nærmasti granni hjá kommunulæknunum. Vit arbeiða við at fáa skipað heilsudeplar kring landið, og eg ímyndi mær, at tað við tíðini verður so, at økispsykiatriin eisini her á staðnum verður partur av tí.

----

Samanumtikið eru nógv tøk tikin, sum vit veruliga skulu gleðast um. Psykiatriin er í rúkandi menning við eldhugaðum starvsfólkum, sum dag og daglig gera eitt fantastiskt arbeiði. Tað gongur framá at fáa rekrutera starvsfólk, og komandi ár fara at at kunna bjóða enn fleiri tilboð innan barnaspykiatriina. So vit eru á rættari leið.

Og vit hava øll møguleika at ávirka, at vísa umsorgan, vera góð við okkara medmenniskju, og vera við til at bróta tabu og vera eitt inkluderandi samfelag.

Eg fari at enda at ynskja okkum øllum hjartaliga tillukku við degnum og vóni, at arbeiði verður til signingar fyri fólki í hesum báðum oyggjum. Fari eisini at takka øllum, sum hava fingið hetta at bera til.

Eg takki mangar ferðir fyri dagin í dag og fyri høvið at vera við. Takk fyri!